# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Friðarhátíðin

Jólaboðskapurin ljóðar í myrku tíðini men kemur eisini um tað mundið, tá aftur gongur móti ljósari tíðum. Jólini eru tann stóra hátíðin, har fólk stákast, keypa gávur, geva gávur og tíðin, har nógv verður etið og drukkið. Jólini eru eisini strongd og fíggjarligt trýst. Børnini skulu hava gávur, ið ikki skulu standa aftan fyri tær, ið vinfólkini fáa og tey vaksnu seta seg mangan fyri meira, enn lønin ber. Onnur hava torført við at fáa til dagin og vegin orsakað av arbeiðsloysi ella sjúku.

Men jólini eru eisini tíðin, har vit verða mint á friðarboðskapin, sum fyri meira enn tvey túsund árum síðani varð boðaður nøkrum seyðamonnum uttan fyri ein fátæka bygd í Palestina. Boðskapurin var um frið á jørð, um góðan tokka manna millum og um heimsins frelsara, ið júst var borin í heim. Guds sonur var borin í heim í einum fjósi og stutt eftir gjørdust nýfødda barnið og foreldur tess flóttafolk í grannalandinum Egyptalandi, ið til alla lukku um hetta mundið hevði ein liberalan útlendingapolitikk. Tað er løgið at hugsa sær, at høvdu Jósef og Maria við einum nýføðingi lent í Kastrup í dag, so høvdu tey verið send aftur, haðani tey vóru komin, ella tey høvdu verið stongd inni í Sandholmleguni, har flóttafólk verða so illa viðfarin, at mong fáa sálarlig mein fyri lívið.

Jólaboðskapurin ljóðar í einum heimi, har lítil er friðurin og hóttanarmyndir eyðkenna gerandisdagin hjá stórum pørtum av mannaættini. Ófriður í heimlandi Jesusar, ófriður í Miðeystri, kríggj í Afghanistan, borgarakríggj í Somalia, Sudan og aðrastaðni í Afrika, hungur og hall og veðurlagsbroytingar um heimin. Vána úrslitið á veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn boðar ikki frá góðum, milliónir líða hungur og hall og enn sum áður eru børnini offrini í einum heimi, har ófriður oftani er vanligari enn friður.

Hvat skulu vit so við einum friðarboðskapi í einum heimi, sum ikki tykist vilja taka við hesum boðskapi? Vit skulu sjálvsagt halda fram við at boða boðskapin, vit skulu læra at hugsa jaligt og vit kunnu jú byrja her hjá okkum, eitt nú kundu okkara politikkarar roynt at broytt politisku mentanina, so tónin gjørdist minni harðligur, samstundis sum politikarar kundu lagt seg meira eftir samstarvi enn konfrontatión. Hesin harðrendi tónin gongur út yvir okkara sjálvsvirðing, og tann, sum hevur lítla sjálvsvirðing, megnar ikki at sýna øðrum ta virðing, ið er ein fortreyt fyri friði, vælvirkandi fólkaræði og trivnaði sum heild.

Føroyar, sum hóast búskaparligar trupulleikar, framvegis eru millum ríkastu lond, kundu verið fremri á altjóða vøllinum við menningar- og humaniterari hjálp. Vit kundu í størri mun vent eygunum móti okkum sjálvum og kanna eftir, hvussu vit fara við teimum veikastu – og við hvørjum øðrum. Vit kundu støðugt roynt at vunnið okkum eitt støði fyri jaligum hugsunarhátti, har bjartskygni og vón lógu fremri enn dapurskygni og mistreysti. Soleiðis kundu vit nýtt gleðiboðskapin frá Betlehems vøllum til frama fyri øll úti sum heima. Vit í Miðlahúsinum ynskja øllum føroyingum eini gleðilig jól.

**Sosialurin**

## Standa saman ella klípast?

**JÁKUP AV SKARÐI**



Hatta var løgin leikur! Eg dugi ikki at síggja annað enn at greinaskrivari fyri viku síðani leggur upp til mótspæl. Heldur átti at verið lagt upp til samstarv millum okkum, ið bundin eru av samferðslu sjóvegis. Enn at skjóta eftir nólsoyingum, at Teistin siglir færri túrar.

Sjálvandi merkist tað á farleiðini "Skopun - Gamlarætt", at SSL sparir eina manning. Men í hesum førinum er ikki talan um at nólsoyingar og Ternan taka eina manning. Haldi vert er at venda málinum og seta spurningin: Er ætlanin at flyta manning av Teistanum umborð á Ternuna, heldur enn at senda mennirnar til hús - vegna sparing?

Í drúgvu verkætlan okkara at fáa til vega nýtt skip til Nólsoyar, hevur undirritaði alla tíðina víst á tveir vansar: Ferðsluruðuleika í Nólsoy og farmaviðurskiftini í Skúvoy!

Tað fyrra verður til okkum lokalt at finna útav - saman við Tórshavnar býráð - soleiðis at bygdalívið og hetta at børn og vaksin kunnu kenna seg trygg á smølu vegunum í Nólsoy, ikki verður skatt ov nógv.

Tað seinna er ikki til okkum í Nólsoy, at arbeiða við, men hevur týdning. Tí øll hesi árini Ritan ongan túr hevur siglt til Nólsoyar týsdag frá kl. 9:30 til 16:20 (og hósdag skal verða tøk um veðrið ikki er til vildar í Skúvoy týsdag), er orsøkin tann, at hon skal røkja farmaleiðina til Skúvoyar. Kanska skotið kundi verið vent, soleiðis at gongd kundi komið á politiskt, at skúvoyingar fingu trygt samband?

Skrivað verður um framgongdina, fyri okkum í Nólsoy, at Ternan verður sett inn. Tíbetur er hetta bert fyribilsloysn, tí niðanfyri loyvi eg mær at seta nakrar vansar upp:

- atløguviðurskiftini eru ikki fyrireikað
- avlýsingar fyri veður verða fleiri
- túratalið verður skert.

Fyri at taka í tað seinasta, so verður við nýggju ferðaætlanini ikki talan um at vitja í Nólsoy til náttúrðabita, konfirmatión og føðingardagar - í vón um at sleppa inn aftur um kvøldið, tí okkurt kvøld er seinasti túrur úr Nólsoy kl. 18:25 og onnur kvøld er seinasti túrur kl. 19:25. Annar vansi við broyttu ferðaætlanini er, at tá ið fyrsti túrur úr Havn er kl. 7:55, verður neyðugt at broyta skúlabyrjanina, tí lærarar úr Havn ikki kunnu møta kl. 8.

Fyrimunir eru eisini við at bilferja verður sett inn - enntá við Ternuni sum fyribilsloysn:

- munandi betri umstøður verða hjá rørslutarnaðum
- munandi lættari verður at fáa farm til og frá
- til ber at skilja húsarhaldsruskið
- til ber at flyta sjúklingar við sjúkrabili.

Vónandi kunnu vit, ið nýta ferjur í gerandisdegnum, standa saman at tryggja farleiðir og ferðaætlanir, ið samsvara tíðini vit liva í.

Minst til! Verður farið undir verkætlanina at byggja nýggja ferju til nólsoyarleiðina, so kunnu nøkur arbeiðspláss verða tryggjað í gott og væl eitt ár. Harafturat er at hava í huga "know-how", ið er av alstórum týdningi bæði fyri skipasmiðjur og aðrar fyritøkur, ið ynskja at bjóða seg fram. Sjálvsagt mugu vit minnast til at samfelagið ikki kann steðga upp, men at slík verkætlan sum hendan er av teimum fáu sum løgukarmurin kann bera: Talan er um áleið 20 millionir um árið í tvey ár!

Við ynskjum um eini gleðilig jól og bata í komandi ári.

## Nú má Løgmaður blandað seg!

**JÓGVAN PHILBROW**
Nevndarlimur Føroya pedagogfelag



Støðan tykist at vera púra galin innan Almannaráðið, og tykist tað sum um, at ráðharrarnir ið hava sitið og sita, ikki hava ella hava havt tamarhald á málsøkinum.

Vanrøkt av málsøkinum tykist heldur at vera reglan enn undantakið.

Nýggjasta "katastrofan" frá Almannaráðinum er støðan har ið Nærverki niðurleggur ein ½ stovn, fyri síðani, at flyta hann út á bygd. Nærverki gloymir, at stovnurin, ið skal niðurleggjast er lagdur saman við øðrum stovni fyri hálvum ári síðani og at øll starvsfólkini tá hava fingið boð um at tey nú arbeiða á samanlagda stovninum. Nevniliga "Nýggi bústovnurin". Alt málið ber brá av tilvildarligum ætlanum og óskili.

Nærverki "gloymir" eisini at hesin sami stovnur, ið nú sigur fólki úr starvi, hevur akkurát søkt eftir nýggjum fólkið, ið eru við at verða sett. Samstundis sum onnur á stovninum verða søgd úr starvi tí stovnurin verður niðurlagdur. Hetta er ikki sørt undarligt og sera vanvirðiligt farið fram – *hetta er jú bert ein leikur í vanvirðisligu viðferðini av økinum børn og ung.* Fyrr í ár bórust knappiliga tíðindi um at hesin stovnur skuldi flyta til Mjørkadals. Hvussu var ikki við barnadeildina og familjudeildina á Barnaheiminum, fyrr í ár? Gøla eftir gølu. Hetta kundi sæð út sum fríggjadags klummuna í útvarpinum, men tíverri er hetta tann beiski veruleikin.

Tað tykist mær púra greitt, at Almannaráðið ikki fylgir starvsfólkapolitikkinum hjá landinum. (*Sí heimasíðuna hjá løgmannskrivstovuna: www.tinganes.fo*) Hetta í sær sjálvum, er sera vánaligt og átaluvert. Tað kann ikki vera rætt at ein almennur myndugleiki kann fara so illa við sínum starvsfólkum.

Hevur Almannaráðharrin ikki tamarhald á støðuni, ella er tað viljin tað er galið við ella bert manglandi innlit? Tí hetta er ikki fyrstu ferð at mál verða skeivt handfarin. Fyrrverandi ráðharrin Hans Pauli Strøm fekk nakrar átalur frá løgtingsinsumboðsmanni tað tíðina hann sat. Man tað ikki vera, at sami grundleggjandi trupulleikin er afturvendandi, tí eingin hevur nóg breiðan rygg at loysa hann?

Sum námsfrøðingur haldi eg at største trupulleikin innan megin partin av námsfrøðiligaøkinum er, nevniliga, manglandi ella eingin løggáva. Samantvinna við manglandi politiskar málsetningar og hugsjónir. Ella sagt soleiðis – eingin sigur hvat tað er fyri tænasta borgarin hevur krav uppá.

Sjálvandi veit eg at lógin um barnavernd er til, men hví er tað tá so lætt, ikki at veita tey tilboð ið hesi børn og ung hava krav uppá? Men innan serstovnaøki er bert forsorgarlógin galdandi, og er hendan ein gomul og ótíðarhóskandi lóg.

Samstundis er tað átaluvert, at námsfrøðin fær so lítla, og ofta onga rúmd á stovnum, ið klárt hava eina námsfrøðiliga uppgávu í samfelagnum. Sjáldan ella ongantíð verður lýst eftir námsfrøðiligum fakfólki, fakfólk vera ikki spurd um ráð tá ið broytingar skulu gerast, alt hetta týður uppá at virðingin fyri tí servitan námsfrøðingar hava ikki er serliga stór. Gongdin tykist vera, innan námsfrøðiligar stovnar undir Nærverkinum, at teir í størri og størri mun skulu gerast goymslustovnar og ikki menningarstovnar. Hetta minnir ikki sørt um "Rødbygaard" støðuna.

Nú má skil fáast á Almannaráðnum og har undir Nærverki. Tá Ráðharrin ikki hevur stýr á støðuni – er ikki tá tíð hjá Løgmanni, at traðka til?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.